Heri Mortensen, stjóri:

— Dánjal av Rana lýgur

— Úttalilsini hjá Dánjal av Rana í Dagblaðnum eru einki annað enn vanlig hevnd og óndsinnað lygn, sigur Heri Mortensen, stjóri





Heri Mortensen

DAGBLAÐIÐ 29. JUNI 1987 — SÍÐA 5

Dánjal av Rana, nevndarformaður í Tvøroyrar Flakavirki:

— Mín størsti sigur higartil

— Í fleiri ár havi eg stríðst ímóti ti maktsjúku, sum nú ræður í landsstýrinum, men nevndarfundurin í morgun kendi eg sum mín størsta persónliga sigur higartil.

— Føroya landsstýri hevur størstu skuld í humbukkinum, sum verið hevur í flakavirkinum.

— Grannskoðarar prógva nú, at Tvøroyrar flakavirki hevði vánaligast úrslit fyrstu 5 mánaðirnar í ár av 8 flakavirkjum.

Hetta sigur ein hart royndur Dánjal av Rana við Dagblaðið.

— Nú havi eg stríðst í nógv ár mótí harðkjarnum, sum valdar í landsstýrinum og hevur valdað á Tvøroyri. Mangan hevur ein verið í deprurhuga og kent seg einsamallan í stríðinum móti yvirmáttini.

— Men nevndarfundurin í morgun hjá Tvøroyrar flakavirki má kallast mín størsti sigur higartil. Tá atkvøddu 5 av 7 limum fyri, at flakavirkið framhaldandi skal vera limur í Føroya Fiskasølu.

Hetta sigur ein móður, men tóliga væl nøgdur Dánjal av Rana, nevndarformaður hjá virkinum, formaður í arbeiðsmannafelagnum Fylking og borgarstjóri á Tvøroyri, í samrøðu við Dagblaðið frigga kvøldið.



Dánjal av Rana, nevndarformaður á Tvøroyrar Flakavirki, í arbeiðsmannafelagnum Fylking og borgarstjóri á Tvøroyri.

«Grannskoðað rakstrartal fyri Tvøroyrar Flakavirki prógva nú, at virkið var fyrstu fimm mánaðirnar av 1987 víst vánaligasta úrslit millum átta virki,» upplýsir Dánjal av Rana fyri Dagblaðnum.

(mynd: Sosialurin)

LOKABREIGD ÚR TINGANESI

— Upprunin til alt rumblið á flakavirkinum við út- og innmelding í Fiskasøluna er at finna í landsstýrinum, sigur Dánjal.

— Føroya landsstýri eigur stærsta leiklutin í tí vanførliga sjónleiki, sum ein óvanliga og ikki fullmannað virkisnevnd útsetti virkið fyri alment, tá stjórin legði til brots og kunngjørdi útmeldingina í blaðnum, samstundis sum hann greiddi frá, hvussu vøl virkinum hevði gingið undan fyri Fiskasølunni. Hetta er nevniliga ikki rætt — mest um tað sennir, sigur Dánjal.

— Umboðsmaðurin hjá landsstýrinum í nevndini, Karl Jespersen, átti at verið loyalur móti merilutanum og ikki verið tungan á vegskálini, tá ein so álvarsalig avgerð skal takast av eini annars ikki rætt samansettari nevnd.

— Men eisini tey lokabrøgdini fekk Karl boð um úr landsstýrinum, heldur Dánjal fast við.

HEILIR 5 MÓT BARA 2

Úrslitið á nevndarakvaðgreiðsluni frigga aftan var annars heilar 5 atkvøður fyri framhaldandi limaskapi móti bara 2 fyri útmelding. Her er koppað á síðan fyrra fundin, sum endaði við útmelding, fyri fundurin var boðin aðalfundin, um tað Gunnar Vestergaard, nevndina fyri Signar Dam og Kristin Michelsen fyri Hermund Mikkelsen.

Gunnar Vestergaard, Asla Jespersen, Olavur Simonsen, Kristin Michelsen og og sjálvur atkvøddu í dag fyri framhaldandi limaskapi í Fiskasølu, sigur Dánjal.

— Dánjal Jakup Jensen, sum umboðar 10.000 kr. í partapeningi hjá Útróðrarfelagnum, og Karl Jespersen, sum er umboðsmaður hjá landsstýrinum, hildu fast um sína atkvøðu fyri útmelding, og hana hevdu teir eisini seinast.

— Men fyrra fundin atkvøddu umframt teir báðar eisini Signar Dam, sum bara umboðar 10% av privata partapeningunum og ikki longur er nevndarlimur, og Jóannes Eidesgaard, sumarsakað av sjúkrafráværu hjá Hermundi Mikkelsen sat sum tiltaksmaður í nevndini, fyri útmeldingini, greiðir Dánjal frá.

RINGAST AV Á VIRKJUM

— Í morgun kendi eg tað á mær, sum móstaðan móti okkum er nógv vikna. Tað hevur eydnast at fáa fólk at skilja, hvat ætlanin hjá hini klikkuni var við útmeldingini. Ter ætlaðu sjálvir at sita við vinningi og avlopi av søluni, meðan virkið gekk illa.

— Nevndarlimirnir lurtaðu eisini við áhuga eftir skiftamonnum, tá vit høvdu fund við Fiskasøluna frammanundan.

— Tað mest avdukandi og skelkandi var tó, at grannskoðarin hjá Tvøroyrar Flakavirki hevur júst prógvað fyri nøgga nevndir, at fakturaroðrið hjá virkinum er nógv verri, enn Heri Mortensen hevur sagt av í Sosialinum.

— Grannskoðarin prógvaði, at fyrstu fimm mánaðirnar av 1987 liggur Tvøroyrar Flakavirki á botni millum 8 flakavirki í landinum. Skiftsavlopið hjá okkum er bara 1,72 kr. kiló, meðan miðal fyri hesi nevndu virki er 2,04 kr.

— Hetta er so tekin um, at solo-spælið hjá hinum partinum er ikki tíl gagns ella hetturs fyri virkið, sigur Dánjal av Rana, formaður í nevndini hjá Tvøroyrar Flakavirki, at enda í viðmerking til Dagblaðið.

O.B.



Tvøroyrar flakavirki fer ikki úr Føroya Fiskasølu. Hetta avgjørdu fimm av sjey nevndarlimum í Tvøroyrar flakavirki á fundi seinasta fríggjadag. Sostatt er avgerðin hjá gomlu nevndini um at taka virkið úr Føroya Fiskasølu frá 1. januar 1988 vorðin av ongum.

Skuldsetingar í Dagblaðnum

Í gjár hevði Dagblaðið samrøðu við nevndarformannin í Tvøroyrar flakavirki, Dánjal av Rana, har hesin kemur við rættiligu hørðum skuldsetingum ímóti verandi stjóranum Hera Mortensen og fyrrvernadi nevndarformanninum Signari Dam. Dánjal av Rana skuldsetir teir báðar fyri at hava ætlanir um at koyra avlopið av søluni í egnan lumma, meðan tað skal ganga illa hjá virkinum.

Eisini vísir hann í samrøðuni á, at grundarlag var ikki fyri at taka virkið úr Fiskasøluni. Fesk tøl yvir raksturin á virkinum teir fyrstu mánaðirnar í ár skulu vísa, at úrslitið hevur verið sera vánaligt og ringast av tilsamans 8 virkjum, sum eitt grannskoðaravirki hevur kannað.

Ongan vinning í egnan lumma

Vit hava biðið Hera Mortensen, stjóra, um eina viðmerking til hesi úttalilsi í Dagblaðnum og spurdu hann, um tað veruliga hevur verið ætlanin at stinga pengar í egnan lumma, heldur enn í kassan hjá flakavirkinum!

Heri Mortensen: — Hatta er júst tað, sum Dánjal av Rana alla tíðina hevur roynt at leypa út í orð um meg. Men til hetta er at siga, at hvørki Heri Mortensen ella Signar Dam hava nakrantíð fingið nakran vinning fyri tað, sum flakavirkið hevur selt uttanfyri Føroya Fiskasølu í skjótt 10 ár. Flakavirkið hevur selt og hevur fingið hvørt eitt tað einasta oyra. Tá vit hava selt gjøgnum onnur feløg, so hava tey fingið prosentgjald fyri søluarbeiðið og hesi prosentini hava altíð verið lægri enn tey Fiskasølan tekur fyri at selja.

Rækjurnar!

— Tit hava so heldur ikki havt í kvittanum at stovna tykkara egna sølufelag?

— Ongantíð. Tað, sum Dánjal av Rana sipar til, er, at vit hava selt rækjurnar hjá Faroe Prawns sjálvir. Tað er so ein erlig sak, at man vil selja rækjurnar frá sínum egna skipi sjálvur. Men hetta hevur einki við nakað sølufelag at gera.

Heri Mortensen sigur viðari, at hesar grovu skuldsetingarnar móti sær og fyrrverandi nevndarformanninum, sum Dánjal av Rana ber fram í Dagblaðnum í samrøðu við Óla Breckmann, eru einki annað enn vanlig hevnd og óndsinnað lygn.

— Dánjal av Rana sigur í samrøðuni, at úrslitið hjá virkinum er ikki so gott sum m.a. tú hevur gabbað tær av í eitt nú Sosialinum. Hvat hevur tú at viðmerkja til tað?

— Heldur ikki hatta er rætt. Grannskoðarin hjá Tvøroyrar flakavirki, sum er Carl Vilhelm Weihe, segði á tí seinasta nevndarfundinum, sum var áðrenn sjálvan aðalfundin, at Tvøroyrar flakavirki var eitt tað best rikna virkið í landinum. Tað, sum Dánjal av Rana nú sipar til í Dagblaðnum, er ein frágreiðing, sum grannskoðaravirkið hevur gjørt um støðuna hjá tilsamans 8 flakavirkjum. Har verður so m.a. skiftisavlopið roknað út. Eg